ALMENN MÓTTØKA

# Mentamálaráðið og Landsverk bjóða til almenna móttøku

Mánadagin 16. mars kl. 15.00 verður nýggi Skúladepilin í Suðuroy handaður Mentamálaráðnum. Í hesum sambandi bjóða Mentamálaráðið og Landsverk til almenna móttøku í skúlanum.

**Skrá:**
**Kl. 15.00:** Landsverk handar Mentamálaráðnum depilin.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, Ole V. Laursen, deildarleiðari á Miðnámsskúlanum í Suðuroy, Jórun Petersen, deildarleiðari á Heilsuskúla Føroya, Árni Winther, stjóri á Árna Winther Arkitektum og umboð fyri MT Højgaard Føroyar halda røðu.

Eisini verður livandi tónleikur við kóri úr Skúladeplinum í Suðuroy og bólki úr Miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Hvørvi verður hjá fólki at síggja skúlan, og drekka og ábit verða at fáa.

**Øll eru vælkomin.**

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleika-uppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

www.us.fo

# Starvsfólk til kunningar- og viðskiftasamskipan

Søkt verður eftir starvsfólki at standa fyri kunningar- og viðskiftatænastu á stovninum. Starvið umfatar røkt av heimasíðu, móttøku, framleiðslu og samskipan av kunningartilfari, avgreiðslu av fyrispurningum og gerð av frágreiðingum frá stovninum. Starvið umfatar styrkjan og menning av interna og externa samskiftinum hjá stovninum.

## Førleikar
Umsøkjari skal hava førleikar innan kunning, samskifti ella marknaðarføring. Tað er neyðugt at duga at arbeiða sjálvstøðugt, verða álítandi og hava góð samstarvsevnir. Eisini skal umsøkjari hava lætt við at orða seg í talu og skrift, hava góðan málsligan kunnleika, góðan telduførleika og skal verða sera fyrikomandi.

## Setan
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Fyrispurningar
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Susan V. Danielsen, skrivstovuleiðara, ella Jákup Paula Joensen, stjóra, á tlf 342400.

Umsókn saman við prógvum, CV o.l. skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 26. mars 2009. Umsøknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Postboks 2048
FO-165 Argir, Føroyar

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyritur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo

www.us.fo

# Starvsfólk til umhvørvisvernd

Søkt verður eftir einum fólki at standa fyri skráseting og kortlegging av dálkingar-keldum, at gera vegleiðingar og at verða partur av umhvørviseftirlitinum. Tú kemur at arbeiða á deildini, sum fyrisitur lóggávu á umhvørvisøkinum. Harafturat fevnir arbeiðið á deildini um útgreining av tiltøkum at minka útlátið av veðurlagsgassi, uppgerðir av umhvørvishagtølum og luttøka í millumtjóða umhvørvissamstarvi.

## Førleikar
Starvið er fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan verkfrøði, umhvørvistøkni, náttúruvísund, e.l.

Vit sóknast eftir fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, sum sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugur væl at samstarva, hevur kunnleika til edv-skipanir og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur royndir innan kortlegging, GIS og fyrisiting. Koyrikort til bil er ein treyt.

## Starvsmøguleikar
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í tøttum samstarvi við starvsfelagar, góðar møguleikar fyri persónligari menning og sjálvstøðugum arbeiði.

## Setan
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Talan er um tíðaravmarkað starv fram til 31. desember 2009. Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Fyrispurningar
Víst verður til okkara heimasíðu www.us.fo. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóhonnu Olsen, deildarleiðara, ella Jákup Paula Joensen, stjóra á tlf 342400.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 19. mars 2009 kl. 12.00. Umsøknir skulu sendast til:

**Umhvørvisstovan**
Postboks 2048
FO-165 Argir, Føroyar

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyritur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd.*

sansir.fo



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

